# TF Holding keypt Eik

**Tað kom helst ikki óvart á nakran, at tað gjørdist TF Hoding, sum gjørist nýggi eigarin av Eik Banka, men bíligi prísurin undrar**

Leo Poulsen




*Tað vóru Regin Hammer, stjóri, og Birgir Mohr, nevndarformaður, sum boðaðu vælmannaða miðlaflokkinum frá keypinum av Eik Banka*

Tað var eitt vælmannað miðlalið, sum møtti til tíðindafund hjá TF Holding á Kongabrúnni gjáramorgunin.

Flestu høvdu vælsaktans gitt, hvat tíðindafundurin snúði seg um, og tí kom tað ikki óvart á, tá Regin Hammer, stjóri í TF Holding, boðaði frá, at íløgufelagið hevði keypt Eik Banka.

Fyribils avtala er undirskrivað, og sambært henni skal TF Holding yvirtaka Eik Banka 1. Februar. Keypsprísurin er 450 milliónir krónur umframt hundrað milliónur krónur um bankin fer at geva eitt serliga gott úrslit.

TF Holding keypir í fyrsta lagi 70% av bankanum við forkeypsrætti til eftirverandi 30%. Regin Hammer upplýsir, at bankin ikkki verðu rbørsskrásettur, tí TF Holding vil eiga bankan einsamalt.



Bankin er virðismettur til 900 milliónir krónur, og tí má sigast, at tað er rættiliga bíligt at fáa 70% av bankanum fyri 450 milliónir krónur – eisini um eitt serstakliga gott úrslit merkir, at TF Holding skal leggja hundrað milliónir krónur á borðið aftrat.

Stjórin í TF Holding vil ikki upplýsa nakað um, hvør fer at sita í nevdini, ella hvør nýggi stjórin er. Hann avsannar tó, at nýggi stjórin verður Gunnar í Liða.

Tað er hinvegin lítið sannlíkt, at TF Holding keypir ein stóran banka uttan at hava eina rættiliga góða hóming av, hvør leiðslan í bankanum skal vera. Stjórin sigur við fjølmiðlar, at Jørn Astrup Hansen helst fer at sita sum stjóri í skiftistíðini fram til TF Holding yvirtekur Eik 1. Februar. Hann vísir eisini á, at Fíggjarligt Støðufesti framvegis eigur 30% av bankanum, og tí eisini eigur rætt til nevndarlimir, og tí kann hann ikki avvísa, at Jørn Astrup Hansen fær ein sett í nevndini.

Regin Hammer sigur, at tað verður upp til nýggju nevndina at finna nýggjan stjóra, og at tað síðani verður upp til leiðsluna at skipa bankan frameftir.



*Tað var stórur áhugi í fjølmiðlunum fyri tíðindafundinum hjá TF Holding gjáramorgunin*